# Gjáargarður

Fyri trimum árum síðani skifti Gjáargarður eigarar. Tá keypti Eirik Suni Danielsen saman við øðrum gistingarhúsið við Gjógv. Áðrenn nýggju eigararnir tóku yvir Gjáargarð, var tað bert opið á leið tveir mánaðir um árið, men nú er gistingarhúsið opið alt árið.

Umstøðurnar á Gjáargarði eru sera góður. Í løtuni hava tey 70 yvirnáttingarpláss, men komandi ár vera umstøðurnar enn betri. Gjáargarður er nevniliga í gongd við at byggja 12 spildurnýggj og sera góð kømur í einum bygningi omanfyri Gjáargarð. Gjáargarður hevur annars úr at gera, og serliga um summarið er nógv fólk á vitjan.

- Vit hava stóran aktivitet í húsinum um summarið. Her eru alla tíðina nógvir gestir á vitjan, og fólk hava eisini møguleika at koma fram við at fáa sær ein bita at eta. Vit hava eisini góðar umstøður til skeiðvirksemi, og hetta gera vit nógv við um veturin. Harafturat skipa vit fyri føðingardøgum, brúdleypum og tílíkum, umframt at vit hava skipaðar túrar fyri fyritøkur, sigur leiðarin á Gjáargarði, Eirik Suni Danielsen.

Gjógv hevur annars eina sera vakra náttúru at bjóða gestunum. Gestirnir kunnu vitja gjónna, teir kunnu fara út til Búgvan, teir kunnu ganga vakra túrin til Ambadal, og so eigur Gjógv fleiri av vakrastu og hægstu fjøllum í landinum. Harafturat hevur bygdin eitt av størstu spæliplássum í landinum – nevniliga stóri hylurin mitt í bygdini.



*Hetta verður útsýnið frá nýggju kømrunum, sum eru í gerð á Gjáargarði. Tey vera ætlandi liðug í komandi ári*




















